

# Óttast at oljuprísurin kemur niður í 10 dollarar fyri fatið

**Jógvan Hugo Gardar**

16.08.2015 - 12:46

Oljan.fo

- Tann amerikanska lættoljan, WTI, kann koma at kosta millum 10 og 20 dollarar fyri fatið. um OPEC byrjar eitt handilskríggj fyri at vita hvør sum noyðist at minka um oljuframleiðsluna fyrst, sigur Gary Schilling, stjóri í A. Gary Schilling Co. í eini samrøðu við Bloomberg.

- Tað sum OPEC sigur er at OPEC-londini ikki koma at minka um oljuframleiðsluna, og so fáa vit at síggja hvør sum klárar kappingina í longdini, sigur Schilling.

Hann sigur at nú er spurningurin bara um hvør sum heldur út í kappingini, og at bara framleiðarar sum framvegis megna at framleiða olju til ein framleiðslukostnað sum liggur omanfyri oljuprísin, koma at orka at kappast.

- Vit eru á veg móti einum oljuprísi sum kemur at liggja millum 10 og 20 dollarar, heldur Schilling.

Amerikanska lættoljan WTI liggur vanliga nakrar dollarar, millum fimm og tíggju, niðanfyri Norðsjóvaroljuna Brent. Óansæð vil ein slík kapping sum Schilling tosar um merkja at eisini Brent-oljan kann enda niðanfyri 20 dollarar fyri fatið.